# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Óskil við starvsetanum

Nógv hevur verið funnist at tí fyrisitingarligu umskipanini, ið Finn Normann Christensen (FNC) stóð á odda fyri á sinni. Endamálið við umskipanini var at smalka almennu miðfyrisitingina, at gera hana meira smidliga fyri ikki um at tala at økja um rættartrygdina við betri málsviðgerð og tryggum mannagongdum. Hvørt alt hetta nú var eitt framstig fyri rættartrygdina skulu vit lata vera ósagt, men á einum øki tóktist hetta at vera galdandi nevniliga, tá talan var um starvsetanir. Landið fekk ein almennan starvsfólkapolitikk, og fyri at eingin ivi skuldi vera um, at alt hetta var meint í álvara, so fekk løgmaður og seinni fíggjarmálaráðharrin, ábyrgdina av starvsfólkapolitikkinum. Starvsfólkapolitikkurin var eitt framstig, tí starvsetanir komu í fasta legu. Reglurnar eru greiðar og almennar og galda fyri alt almenna økið. Eingin er hevjaður upp um hesar reglur!

Alt hetta bøtti ivaleyst um rættartrygdina hjá umsøkjarunum og FNC skipanin skapti møguleikar hjá nýggjum ættarliði av sera vælútbúgvnum fólki, ið kom aftur til landið eftir kreppuna. Miðfyrisitingin gjørdist ikki bíligari – hon gjørdist nógv dýrari. Almenningurin her sum aðrastaðir tykist vera sinnaður at rinda við skattinum fyri eina stóra og dýra miðfyrisiting, um almenningur og vinnulív fáa betri rættartrygd, skjótari og betri tænastur og ikki minst politiskar avgerðir tiknar á haldgóðum fyristingarligum støði.

Mong hava leingi spurt um okkara risastóra og sera kostnaðarmikla miðfyrisiting lýkur hesar fortreytir. Vit skulu ikki her taka dagar í hesum spurningi, men alt fleiri dømi og alt fleiri atfinningar frá Løgtingsins Umboðsmanni benda á, at unga og yvirvaksna miðfyrisiting okkara ikki lýkur slíkar sjálvsagdar fortreytir. Hetta tykist serstakliga vera galdandi fyri starvsetanarmál, ið júst var tað økið, ið nýggja skipanin var ætlað at bøta um. Hetta er mikið spell, tí fer starvsfólkapolitikkurin á glið, so skaðar hetta umdømið hjá allari miðfyrisitingini. Hetta gongur út yvir trúvirðið hjá øllum stjórnarráðum - tað er sum kunnugt ikki bert Uttanríkisráðið, sum hevur ilt í setanarpolitikkinum – her eru fleiri syndarar, eru teir nevndir, so eru teir kendir.

Seinasta málið hjá Uttanríkisráðnum minnir um eina gølu og hava vit kanska bert sæð toppin á ísfjallinum. Her hava vit eitt stjórnarráð, við sjálvum varaløgmanni sum evsta leiðara, sum uttan at blunka setir seg yvir alment galdandi starvsfólkapolitikkin. Tað kann væl vera, at leiðslan í Uttanríkisráðnum ikki beinleiðis hevur brotið nakra lóg, sum privatu løgfrøðiligu ráðgevar ráðsins tvíhalda um. Men tað er uttan fyri nakran iva, at URR hevur brotið tær fyrisitingarligu siðvenjur, sum eru galdandi á økinum og sum byggja á skrivligar og alment góðkendar reglur. Uttanríkisráðið hevur hartil brotið galdandi reglur, ásettar av Fíggjarmálaráðnum, og sum øll onnur stjórnarráð eru noydd at rætta seg eftir. Ráðið hevur í hesum máli sýnt eina so grovа maktarrogansu, at hvørki løgmaður ella Løgting kunnu lata hetta um seg ganga. Gera tey tað, so er álitið millum manna til alla miðfyrsitingina fokið.

**Sosialurin**

## Sjúklingurin úr fokus

**VÁR Í GONG**

Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar



Tað er óhaldbart fyri sjúklingar, starvsfólk og menning í føroyska sjúkrahúsverkinum, at Landsstýrið enn eina ferð leggur upp til skerjingar á Landssjúkrahúsinum, har ótryggleiki aftur valdar. Tað var tí gleðiligt at hoyra, at ein eykajáttan sum munar er í uppskoti.

**Kaldur ótryggleiki!**
Hesi bæði orðini lýsa væl støðuna á landsins stórsta arbeiðsplássi, Landssjúkrahúsinum

Sjúkrahúsleiðslan hevur boðað frá, at í ár fara at resta uml. 8 mió. kr. í á rakstrinum. Tí skal sparast, og tað eru enn eina ferð sjúklingar og starvsfólk, ið skulu gjalda prísin!

- Aftur og aftur verða sjokkbylgjur sendar inn í føroyska sjúkrahúsverkið. Langtíðarárini eru álvarslig. Menningin av viðgerð og –røkt, fær stóran skaða og steðgar upp, sigur Vár í Gong, formaður í Felagnum Føroyskir Sjúkrarøktararfrøðingar.

Fyri mong kann hetta helst ljóða sum ein endurtøka av knarri ár undan ári, og tað kann eisini arga summi. Hinvegin er neyðugt at skilja, hvussu skaðilig politiska vanstýringin er.

- Úrslitið er, at føroyskir sjúklingar í seinasta enda ikki fáa nøktandi heilsutilboð, ið hoyrir heima í einum hvørjum vælferðarsamfelag. Tað er ein sera álvarslig støða, sigur Vár í Gong.

Hvør orsøkin er til, at játtanin til sjúkrahúsverkið ongatíð røkkur, vil Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar ikki taka støðu til. Hinvegin heitir felagið á allar partar – eisini Landsstýrið og fíggjarnevnd Løgtingsins – um opið og konstrutivt at hyggja at støðuni í dag.

- Um tað gerst neyðugt, mugu stig takast til at eftirmeta og kannað viðurskiftini á virðiligan hátt. At fremja sparingar í óðum verkum er ikki loysn, sigur Vár í Gong, formaður í Felagnum Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar.

- Visiónin er, at sjúklingurin skal vera í fokus, men aftur í ár er fokus einamest á sparingar og skerjingar. Tað er óhaldbart, sigur Vár í Gong.

## Vestergaard má rinda ella fara

Talið av sjófólki, ið manglar at fáa útgoldið minstuløn, veksur í stórum. Og sum tað hevur sæð út, so hevur landsstýrismaðurin við fiskivinnumálum ikki sett sær fyri at halda lógina um inntøkutrygd.

Gerðir landsstýrismanna hava við sær, at familjur um allar Føroyar noyðast at liva av náði frá bankum og øðrum.

Ein løgfrøðislig meting hjá løgfrøðinginum hjá Samtak sigur greitt, at landsstýrismaðurin brýtur lógina óansæð, hvussu hann handlar. Løgfrøðisliga er ongin munur á lógarbrotinum – bæði eru eins álvarsom, men munurin er sera stórur, hvussu lógarbrotini raka.

Hví landsstýrismaðurin velur at bróta júst lógina um inntøkutrygd er at undrast á, serliga tá ið hugsað verður um, hvussu stórar fíggjarligar avleiðingar hetta hevur fyri hópin av familjum runt alt føroya land.

Formaðurin í fiskimannafelagnum hevur verið í samband við landsstýrismannin stutt eftir at peningurin var uppi, og fekk tá ta greiðu fatan, at hetta mál fór at vera avgreitt, men tað tekur drúgva tíð, um landsstýrismaðurin skal bíða til eykajáttanin er farin ígjøgnum tingið.

Hví landsstýrismaðurin hevur drála í hesum máli er óskilligt. Landsstýrismaðurin kundi fingið peningin til vega við einum fíggjarnevndarskjali sama dag, sum peningurin var uppi. Eisini kundi hann havt fingið peningin til vega fyrr í árinum, tí framrokningarnar hava talað sítt greiða mál um, at játtanin fór ikki at halda.

Samtak mælir landsstýrismanninum til at rinda peningin í stundini til tey sjófólk, sum eiga pening til góðar, ella noyðist hann at leggja frá sær. Tað er óivað hópurin av góðum fólki, ið kunna taka við hansara sessi, og sum í hesum máli høvdu raðfest øðrvísi.

**Samtak**

## Flogvøllur: Leyp ketan av

**ÓLI MIKKELSEN**

lækni



Bjarni Djurhol hevur grein í bløðunum undir heitinum: Nú ketan leyp av.

Síðst í greinini skrivar hann um týdningin av at fáa nýggjan altjóða flogvøll. Longu í 2005 setti hann kanningarnevnd, og úrslitið í vetur fer óivað at geva greiða ábending um, hvar nýggjur flogvøllur skal liggja.

Í kringvarpinum her fyri ljóðaði, at innflúgvingarkanningarnar skuldu gerast. Eg ógvaðist við.

Innflúgvingarkanningar skuldu gerast í Søltvík og á Glyvursnesi, men ikki eitt orð um Skorhædd.

Í meir enn 40 ár hevur Skorhædd verið mett sum besta stað til nýggjan flogvøll. Er tað veruliga so, at kanningar á Skorhædd koma undir heitið hjá Bjarna: »Fleiri luftkastellir hava verið«, og at Skorhædd ikki er verd at vera við í kanningini. Er hetta so, sakna vit haldgóðar grundgevingar, annars verður niðurstøðan, at okkurt er lopið av.

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.